# Barnaverkætlanin 2023 – 2026

Landsstýrismaðurin í Barna- og útbúgvingarmálaráðnum hevur saman við landsstýrisfólkunum í Heilsumálaráðnum, Løgmálaráðnum, Almanna- og mentamálaráðnum og formansskapinum í Kommunufelagnum, tikið stig til at orða eina framskygda visión um at skapa bestu karmarnar um eitt gott lív hjá børnum og ungum í Føroyum.



**Margit Stórá - Heðin Mortensen - Djóni N. Joensen - Torbjørn Jacobsen - Sirið Stenberg - Bjarni K. Petersen**
HMR KF BUMR KF AMMR LMR
*Tinganes 28. mars 2023, Semjuskal um felags tilgongd til frama fyri børn og ung undirskrivað*

**Tilverugrundarlagið.** Semjuskalið er tilverugrundarlagið undir Barnaverkætlanini. Her verður m.a. staðfest, at økt samstarv er neyðugt fyri at tryggja, at børn og ung kunnu verða sett fremst í tænastuveitingunum. Partarnir vilja virka í felag fyri at finna loysnir, sum kunnu sameina og samskipa tænastur, ið verða veittar børnum og ungum, til tess, at tey kunnu hava viðburð og trivnað.

**Høvuðsmálið** er at laga niður forðingar, sum kunnu vera millum ymiskar skipanir, tá tørvur er á at tryggja sameindar og samskipaðar tænastur. Fyri at røkka hesum málum er gjørt av at skipa arbeiðið í eini verkætlan.




**Manning og karmar.** Stýrisbólkurin og verkætlanartoymið er mannað, og á fyrsta stýrisbólkafundi 11. mai 2023, var ein yvirskipað tilgongd 2023-26, eitt verkætlanargrundarlag og – bygnaður Mai–Des. 2023 góðkent.



## Verkætlanargongd 2023 – 2026

Støðið undir ætlanunum er tikið í politisku visiónini, endamálsorðingunum og ta kós, sum stýrisbólkurin hevur sett.

**Endamálið** er ein meira fokuserað sameining og samskipan av menningarátøkum tvørtur um geira- og stovnsmørk fyri at náa:

- eina meira miðvísa raðfesting av átøkum, tænastum og veitingum
- einum sterkari førleikagrundarlagi í teimum fakligu umhvørvunum
- betri møguleikum fyri samvirkan, sameining og samskipan og eisini
- betri gagnnýtslu av verandi tilfeingi




**Tilgongdin**

skilur seg burturúr flestu almennum verkætlanum innan sama øki, sum t.d. eftirmetingar, greiningar og álit.

Ætlaða tilgongdin byggir á háttaløg og meginreglur fyri menning frá nýggjastu altjóða granskingini innan fyri strategi og leiðslu innan tað almenna (Network Public Governance). Tað hevur við sær, at umboð fyri allar partar er breitt og áhaldandi involverað, og at tey fáa møguleika at verða hoyrd og fáa veruliga ávirkan á loysnirnar. (Co-creation)

## Høvuðsuppgávan April - Desember 2023

Høvuðsuppgávan er at kortleggja og savna vitan um, hvat tað vil siga at hava eitt gott lív hjá børnum og ungdómum. Kortlagdar verða eisini tær týðandi avbjóðingar foreldur, sjálvbodnir felagsskapir og fakprofessionell uppliva í gerandisdegnum og í almennu stuðulsskipanunum. Frágreiðingar og álit innan viðkomandi økir her heima hjá okkum seinastu árini hava varpað ljós á avbjóðingar og loysnir og verða tikin við í kortleggingini.

Høvuðsveitingar september 2023. Kortleggingin, niðurstøður og tilmæli verða skjalfest í fleiri partsfrágreiðingum og í eini samanfatandi frágreiðing síðst í november. Vitanarráðstevna verður hildin 13. november í Norðurlandahúsinum. Øll, ið hava luttikið í arbeiðinum verða boðin við.

Strategiseminarið 6. juni var fyrsta høvi hjá leiðarum og serstakum vitanarhavarum, umboðandi øll týðandi øki, at hittast og verða kunnaðir og høvi var at skifta orð um avbjóðingarnar.

Næsta høvi verður strategiseminarið 5. oktober, har luttakaraskarin er víðkaður. Politisku verkætlanareigarar og politiski fylgibólkurin eru boðin, umframt at ávís serøki eru betri umboðað, m.a. verkætlanin í Vágunum "saman um barnið" og umboð fyri "Ta góða tilgongdina".

Vitanarráðstevna við 200-250 luttakarum verður hildin 13. november í Norðurlandahúsinum.

## Verkætlanaruppgávan 2024

**Kortleggingar- og greiningararbeiðið** á heysti 2023 heldur áfram í 2024, har fokus er á at gera av, hvørjar skipanir, lógir, rættindi og almenn samstørv skulu tillagast fyri at realisera visjónina umvegis ta heildarætlan, ið verður orðað í strategisporinum. Fakligi samskipanarbólkurin stendur fyri at manna skjótt arbeiðandi arbeiðsbólkar, ið hava breiða og holla fakliga, stovns- og økisumboðan. Greiningar og tilmæli verða leypandi viðgjørd í strategitilgongdini.

**Strategitilgongd Februar – September 2024**. Parallelt við kortleggingarsporið verður ein strategitilgongd framd, har ein Heildarætlan stigvíst verður orðað. Heildarætlanin má væntast at fáa ávirkan á málsøkjabýtið, bygnaðin, ta praksis og tey samstarvsmynstur, sum vit hava í dag og nýggjar leiklutir og krøv til førleikar hjá leiðarum og fakbólkum.

Niðurstøður og tilmæli frá arbeiðinum verða viðgjørd á leiðslustøði bæði umsitingarliga (stýrisbólkurin og strategibólkar) og á politiskum støði, áðrenn heildarætlanin verður endaliga góðkend.

## Verkætlanaruppgávan 2025 – 2026

Fyrireikandi lógararbeiði og tillaging av tilboðum (nov. 2024 - sept. 2025 heldur áfram í 2026). Grundað á undanfarandi greiningar, strategiavgerðir og samráðingar um fíggjarætlanina kann eitt lógarfyrireikandi arbeiði setast ultimo 2024 við vón um eina nýggja "barna- og ungdómslóg", sum staðfestir tillagingar í tilboðnum til børn og ung.

Samstundis verður byrjað upp á størri og smærri tillagingar í verandi almennu tilboðum. Tað vil sannlíkt verða sovorðið at styrkja tað fyribyrgjandi arbeiðið, royndarskipanir, pilot "stovnar", førleikadeplar og førleikamenning.

Í fíggjarsamráðingunum fyri 2026 verður lagt upp til, at neyðuga fíggingin verður sett av, soleiðis at fyrstu íverksetanarstigini kunnu verða fíggjað og setast í verk á vetri 2025 og fremjast á vári 2026.

*Ávegis lýsing av Barnaverkætlanini 26.09.2023*

*Ritstjórnað: DPH*